# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tað gongur strúkandi í Danmark. Vit hava frælsi, frið og framburð*

*(Anders Fogh Rasmussen)*

# Ein harðlig ferð í luftini



*KLM-flogfarið hevur sett seg á flogvøllinum í Osaka*

**16 fólk máttu á sjúkrahús, eftir at eitt niðurlendskt flogfar fekk harðliga viðferð í luftini**

FLOGFERÐSLA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey 275 ferðafólkini, sum vóru við niðurlendska KLM-flogfarinum úr Amsterdam til Osaka í Japan í gjár, hugsa seg ivaleyst væl um, áðrenn tey seta sg aftur í eitt flogfar.

Tí ferðin til Japan gjørdist minnilig.

Sambært tíðindastovunum kom KLM-flogfarið í ógvusligan turbolens einar tveir tímar, eftir at tað var farið á flog úr Amsterdam.

- Brádliga legði flogfarið seg á liðina, og lutir flugu runt inni í flogfarinum, segði eitt av ferðafólkunum við japanska sjónvarpið.

Tá viðurskiftini aftur gjørdust vanlig, høvdu 16 fólk, 13 ferðafólk og trý av manningini, fingið skaða, men kortini valdi flogskiparin at halda fram til Osaka, sjálvt um ferðin tekur umleið tólv tímar. Tá flogfarið setti seg í Osaka, stóð fleiri sjúkrabilar fyri tí, og níggju fólk høvdu fingið so mikið álvarssamar snuddir, at tey vórðu flutt á sjúkrahús.

Ein talsmaður hjá japonsku loftferðslumyndugleikunum segði í nátt, at mynduglerikarnir fara at kanna, um flogskiparin tók ta røttu avgerðina, tá hann valdi at halda leiðina fram eftir ta óvgusligu viðferðina, flogfarið fekk. Sambært Reuters skal flogskiparin hava sagt, at hann helt ikki, at nakar hevði fingið so álvarssaman skaða, at tað var neyðugt at venda aftur til Amsterdam.

# Valdi sjálvsstýrisnevndina heldur enn landsstýrið

**Lars Emil Johansen vil sleppa at gera álitið um grønlendskt sjálvsstýri liðugt. Tí fór hann í gjár úr landsstýrinum**

GRØNLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Júst ein mánað, frá 30. apríl til 30. mai 2007, var Lars Emil Johansen landsstýrismaður í grønlendskum fíggjar- og uttanríkismálum. Seinnapartin í gjár handaði hann Hans Enoksen, landsstýrisformanni, umsókn um at sleppa frá beinanvegin, og tað slapp hann.

Tá Lars Emil Johansen gjørdist landsstýrismaður tann 30. apríl, segði hann, at hann ætlaði sær at halda fram sum fólkatingsmaður, tí hann vildi sleppa at gera arbeiðið í grønlendskdonsku Sjálvsstýrisnevndini liðugt. Hann fekk eisini áheitan um at halda fram í nevndini. Men tann serliga valnevndin hjá Landstinginum vildi ikki góðtaka, at Lars Emil Johansen var bæði landsstýrismaður og fólkatingsmaður, og tí gjørdi hann av at siga landsstýrissessin frá sær.

- Eg leggi sera stóran dent á mítt arbeiði í Sjálvsstýrisnevndini og ætli mær at halda fram í nevndini, til álitið er liðugt, segði lars Emil Johansen í tíðndaskrivi í gjárkvøldið.

Fyribils røkir Hans Enolsen, landsstýrisformaður, fíggjarmálini, og landsstýrismaðurin í lógar- og familjumálum, Aleqa Hammond, røkir uttanríkismálini fyribils, til nýggjur landsstýrismaður verður tilnevndur tann 21. september, tá Landstingið kemur samanaftur.



*Lars Emil Johansen*

## STUTT SAGT

### Valsvik og mutur

Grundlógardómstólurin í Teilandi fríkendi í gjár Demokratiska Flokkin fyri allar ákærur um valsvik á tjóðartingsvalinum fyri einum ári síðani. Harafturímóti kom dómstólurin til ta niðurstøðu, at fyrrverandi stjórnarflokkurin TRT var sekur í valsviki, og tveir limir í flokkinum vórðu dømdir fyri at hava goldið einum valnevndarlimi mutur. Tað var fyrrverandi forsætisráðharrin Thaksin Shinawatra, sum stovnaði TRT-flokkin, men grundlógardómstólurin sigur, at flokkurin skal takast av, og at leiðandi flokslimir so sum Thaksin Shinawatra skulu halda seg burtur frá øllum politiskum arbeiði í framtíðini.

### Skifta ikki trúgv

Ovasti dómstólurin í Malaysia staðfesti í gjár, at tað ber ikki til at skifta frá islam til kristindóm. Ein kvinna, sum hevur verið muslimur, men sum nú er vorðin kristin, søkti um alment loyvi til sítt trúarskifti, men dómstólurin sigur, at tað letur seg ikki gera. Teir tríggir dómararnir siga í úrskurðinum, at tað er bara tann islamski sharia-dómstólurin, sum kann geva kvinnuni loyvi til at strika orðið „islam“ í sínum samleikaprógvi og at seta orðið „kristin“ ístaðin fyri. Trúgvandi muslimar eru av teirri áskoðan, at tað er synd at taka við aðrari trúgv.

### Stríðsvognar til sølu

Herurin í Eysturríki hevur í trupulleika. Herurin hevur endurnýggjað fleiri av sínum stríðsvognadeildum, men tað hevur víst seg, at eingin vil hava teir gomlu stríðsvognarnar, sjálvt um tir ikki eru stórt meiri enn tíggju ára gamlir. Tí hevur herleiðslan nú sett eina lýsing í bløðini, har fólk fáa høvi til at ogna sær ein stríðsvogn. Fyribils eru umleið 200 stríðsvognar lýstir til sølu.